# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Brell í Handilskjarnanum

**Týsdagin 27. september læt ein nýggjur handil upp í Handilskjarnanum í Havn. Talan er um delikatessuhandilin »Brell«, ið er eitt altnativ til tær vanligu kommersiellu og industriellu matvørurnar**




*Róaldur Jákupsson hevur latið upp delikatessuhandilin Brell í Handilskjarnanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

HANDIL

Tað er Róaldur Jákupsson í Hoyvík, sum eigur og rekur delikatessuhandilin Brell í Handilskjarnanum í Havn. Róaldur, sum er 31 ára gamal og útbúgvin H.D. í uttanríkishandli, hevur tikið stig til hendan øðrvísi handil av áhuga og entusiasmu.

Handilin »Brell« er ein delikatessuhandil, og har fæst m.a. einkultmarkskaffi, russiskt te, danskt konfekt, fronsk og belgisk sjokuláta og enskt súltutoy. Eisini er eitt breitt úrval av italskum olivenoljum, balsamico edikkum, pasta, pesto, tapanadir, risotto, oliven og antipasto. Víðari kann nevnast, gása-, dunnu- og aðrar patéir, turkaðir soppar, umframt útvaldar dygdargóðar køksbúnyttur so sum franskar LeCreuset grýtur og italskar Bialetti kannur og mokkakannur.

Brell hevur ikki somu vørur sum t.d. FK og Miklagarður, og er tí ikki í kapping við hesar, men hevur heldur lagt seg eftir at selja vørur frá minni framleiðarum, sum ikki eru at finna í vanligum supermarknaðum.

Handilin er komin til, tí ráki í londunum rundanum okkum gongur tann vegin, at fólkið vil hava aðrar og dygdarbetri vørur. Fólk vil hava onnur alternativ enn tær vanligu kommersiellu og industriellu matvørurnar. Mett verður, at føroyingar sjálvsagt eisini fylgja hesum ráki í ein vissan mun, vit fáa í øllum førum møguleikan fyri tí við hesum handlinum.

Handlilin vil eisini hava ein mailinglista, har áhugaði viðskiftafólk kunnu fylgja við í nýggjheitum, og eisini fáa møguleikan sjálvi at koma við hugskotum og inspiratión um hvussu vøruútboðið skal síggja út. Ætlanin er eisini, at handilin hvørja viku hevur onkra smakkiroynd liggjandi frammi, so viðskiftafólkini kunnu royna tær ymisku vørurnar.

Handilin er á niðastu hædd í Handilskjarnanum til høgru fyri rullutrappurnar og er opin mándag til fríggjadag 10-18 og leygardag 10-16.

---

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Mia Kjærbæk,** Vestmanna, andaðist 26. september, 36 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin 30. september klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju leygardagin 1. oktober klokkan 14.

Tey, ið vilja minnast Miu, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu.

---

✝

Tað verður við hesum gjørt kunnugt,
at kæra kona mín og mamma okkara

**Mia Kjærbæk**
Vestmanna

andaðist á landssjúkrahúsinum
mánadagin 26. september, 36 ára gomul.

Kistan fer úr landssjúkrahúskapellinum
fríggjadagin kl. 17.00.

Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju
leygardagin 1. oktober kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hjartvard**
**Bára, Herborg og Svanna**

Tey, sum vilja minnast Miu, kunnu lata Føroya Felag Móti Krabbamein eina gávu.

---

i
Sosialurin

---

## Tøkk

Øllum tykkum mongu, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 90 ára føðingardegi mínum tann 3. september, takki eg so hjartaliga.

**Blíðar heilsanir**
**Kala Jensen, Sumba**

---

## Tøkk

Øll tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 80 ára føðingardegi mínum hin 6. august, takki eg so hjartaliga.

**Blíðar heilsanir**
**Andrea á Dul**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá ið kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Jakob Magnussen**
fyrrverandi prestur, ættaður úr Sørvági

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til heimarøktina í Klaksvík, Sambýlið á Heygnum
og Klaksvíkar sjúkrahús.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðina,
og til tykkum, sum fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.
Tøkk fyri blomur og kransar.

*Vegna familjuna*
**Jytta, Sonja og Asta**

---

## Tøkk

Eina hjartans tøkk verður veitt øllum, sum sýndu
samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði sonur,
beiggi og pápi

**Tummas Johannessen**
Glyvrar

doyði og varð jarðaður.

Til Martin Restorff Jacobsen fyri vøkur orð í
kirkjuni.
Til Jensinu og døturnar fyri vakurt spæl.
Til kirkjutænarar og til øll tykkum, sum fylgdu
honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Mamma,**
**Rúni, Durita og Kristina**